*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2011*

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# *Ársfrágreiðingin 2011*

á Argjum 2012

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2011
© 2012 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 978-99918-854-0-7

Svanamerktur prentlutur 541 705

# *Innihaldsyvirlit*


I. Broyting í ársfrágreiðingini . . . . . . . . . . 8

II. Løgtingsins umboðsmaður 10 ár . . . . . . . . . . 10

III. Grein: Innlit í fyrisitingina . . . . . . . . . . 16

IV. Grein: Fráfaringaravtalur innan tað almenna . . . . . . . . 24

V. Um embætið . . . . . . . . . . 30

VI. Gongdin í 2011 . . . . . . . . . . 32

VII. Hagtøl . . . . . . . . . . 36

VIII. Samandráttir - álit. . . . . . . . . . 46

IX. Skjøl. . . . . . . . . . 53
   1. Umboðsmanslógin . . . . . . . . . . 53
   2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann . . . . . 57

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2011. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2012.

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:

I. Broyting í ársfrágreiðingini
II. Løgtingsins umboðsmaður 10 ár
III. Grein: Innlit í fyrisitingina
IV. Grein: Fráfaringaravtalur innan tað almenna
V. Um embætið
VI. Gongdin í 2011
VII. Hagtøl
VIII. Samandráttir
IX. Skjøl
  1. Umboðsmanslógin
  2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

á Argjum, juni 2012

*Sólja í Ólavsstovu*

# *I. Broyting í ársfrágreiðingini*

Umboðsmaðurin hevur øll árini givið út eina ársfrágreiðing, har greitt hevur verið frá avgerðum í teimum týdningarmestu málunum. Nú tey fyrstu 10 árini eru løgd afturum, er avgjørt at broyta ársfrágreiðingina.

Higartil hevur ársfrágreiðingin varpað ljós á tey mál, sum umboðsmaðurin hevur mett hava almennan týdning, og sum kunnu vera ein vegleiðing um, hvussu líknandi mál skulu viðgerast í framtíðini. Tann tøkniliga gongdin ger, at flest øll á ein ella annan hátt hava atgongd til heimasíðuna hjá umboðsmanninum á alnetinum. Á heimasíðuni finnast allar niðurstøðurnar hjá umboðsmanninum og havi eg mett, at tað ikki longur er neyðugt at endurtaka hesar niðurstøður í ársfrágreiðingini. Í framtíðini verður bert ein samandráttur tikin við í ársfrágreiðingina, meðan álitið í síni heild kann lesast á heimasíðini.

Umframt ein frágreiðing um gongdina í árinum, sum verður víst við ymiskum hagtølum, havi eg valt at viðgera 2 evnir, sum kunnu hava almennan áhuga. Evnini eru: Innlit í fyrisitingina og Fráfaringaravtalur innan tað almenna.

Setarnarmál og mál um innlit hevur fylt nógv í arbeiðinum hjá umboðsmanninum hesi 10 árini, stovnurin hevur virkað, og tí havi eg valt at viðgera hesi evni serstakt.

Ætlanin er í framtíðini at viðgera viðkomandi fyrisitingarrætligar spurningar í ársfrágreiðingini. Spurningar, sum kunnu hava almennan áhuga, ella sum kunnu verða ein vegleiðing hjá teimum, sum arbeiða innan fyri hesi øki.

Av hagtølum, sum framganga av ársfrágreiðingum hjá umboðsmanninum, hevur talið av innkomnum klagum um innlit verið vaksandi, tó

at talan er um smá tøl. Tað er tí ringt at meta um gongdina, herundir um myndugleikarnir eru vorðnir meira kringir í at nýta lógina og veita innlit. Fyri at kanna hetta nærri hevur umboðsmaðurin ætlanir um í 2013 at gera eina kanning av, hvussu myndugleikarnir viðgera áheitanir um innlit.

*Sólja í Ólavsstovu,*
*umboðsmaður*



# II. Løgtingsins umboðsmaður 10 ár

Í flestu demokratiskum samfeløgum hevur lóggávutingið valt ein ella fleiri persónar at hava eftirlit við almennu fyrisitingini. Ein umboðsmaður røkir hetta eftirlitið í flest øllum londum. Longu í 1809 varð í Svøríki sett á stovn eitt embæti, „justitieombudsmannen", sum fyri Ríkisdagin skuldi hava eftirlit við embætismonnum kongsins. Finland fekk í 1919 ein umboðsmansstovn eftir svenskari fyrimynd, og síðani hava lond runt allan heimin sett á stovn líknandi stovnar, sum skulu hava eftirlit við almennu fyrisitingini. Í Føroyum fór fyrsti umboðsmaðurin til verka 1. mai 2001.

Tá 10 ár vóru liðin, síðani Løgtings umboðsmaður fór til verka, varð ein ráðstevna hildin í Norðurlandahúsinum. Á stevnuni helt Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, ein fyrilestur við heitinum:

„Løgtingsumboðsmaðurin – frustratión ella inspiratión". Í fyrilestrinum nevndi Sjúrður, at hann í sínum gomlu skjølum sá, at hann var rættiliga ivingarsamur um ein løgtingsumboðsmannsstovn. Í einum notati, sum hann hevði skrivað til formansskap Løgtingsins í 1997, skrivaði hann, at „centrali spurningurin er at tryggja, at umboðsmaðurin hevur neyðuga yrkisliga førleikan og er nóg óheftur at gera av, hvat er lógligt ella ikki, og fær tær neyðugu ytru umstøðurnar til at gera neyðuga eftirkanningararbeiðið, og at landsfyrisitingin vil, kann og hevur umstøður til at rætta seg eftir avgerðum løgtingsumboðsmansins". Sjúrður minnist, at hann nevndi, at tað var bara ein søguligur persónur, sum í roynd og veru leyk treytirnar at vera umboðsmaður – Guttormur í Múla. Lágvaksin, men sterkur, vitandi, ikki sørur í gandi, lógarkønur og hevði sera stóra virðing millum manna. Ongin setti spurnartekin við tað, Guttormur í Múla segði.

Sjúrður Rasmussen mælti formansskapi Løgtingsins til heldur at styrkja landsstýrismálanevndina við einum sterkum løgfrøðiligum sekretariati, og at geva borgarum betri møguleika at fáa fría rættargongd í rættarkervinum, enn at seta á stovn Løgtingsins umboðsmann.

Ikki bara Sjúrður Rasmussen var ivingarsamur, tá talan var um at seta á stovn ein umboðsmansstovn. Longu í 1978 varð uppskot lagt fyri tingið um ein umboðmansstovn. Løgtingsmaðurin, Jógvan Sundstein, legði fyri tingið uppskot til samtyktar at seta eina 5-mannanevnd at gera lógaruppskot um eina skipan við einum Løgtingsins umboðsmanni. Hóast nevndin, sum fekk uppskotið til viðgerðar, tók undir við tí, fall tað, tí bert 7 tingfólk vóru fyri. Í 1980 royndi Jógvan Sundstein aftur. Hesa ferð saman løgtingskvinnuni Karini Kjølbro, men aftur hesa ferð miseydnaðist royndin. Í 1982 royndu Jógvan Sundstein, løgtingsformaður, og Karin Kjølbro aftur at seta fram sama uppskotið. Løgtingið samtykti tá at seta eina 5-mannanevnd at gera lógaruppskot um eina skipan við einum Løgtingsins umboðsmanni. Nevndin varð vald, men verulig gongd kom ongantíð á nevndararbeiðið, og nevndin lat ongantíð nakað álit frá sær. Í mars 1992 legði Tjóðveldisflokkurin eitt uppskot fyri Løgtingið um at áleggja formansskapinum at seta eitt fólk at gera reglur fyri ein Løgtingsins umboðsmann, eins og at

seta umboðsmannin innan ólavsøku sama árið. Í mai 1993 samtykti tingið hetta uppskotið, soleiðis at umboðsmaðurin skuldi setast innan árslok 1993. Heldur einki spurdist burtur úr hesi royndini.

Tað var ikki fyrr enn Jenis av Rana, løgtingslimur fyri Miðflokkin, í 1999 setti fram uppskot til løgtingslóg um ein umboðsmann, at tað eyðnaðist at fáa samtykt lógina um Løgtingsins umboðsmann. Tann 1. mai 2001 tók Joen H. Andreassen, sorinskrivari, við embætinum sum Føroya fyrsti umboðsmaður. Hergeir Nielsen, sum tá var løgtingsformaður, segði í síni framløgu á 10 ára haldinum, at tá fyrsti umboðsmaðurin skuldi veljast, var fyrireikingin drúgv. Formansskapurin var sera tilvitaður um, at um stovninum skuldi verða lív lagað, galt tað um at finna tann rætta persónin. Ein persón, sum var virdur manna millum. Formansskapurin fekk umsiting tingsins at gera eitt yvirlit yvir allar royndar føroyskar løgfrøðingar, bæði innan- og uttanlands. Tosað varð síðan um, hvør hugsast kundi vera frægast skikkaður í hesum heilt serliga starvi. Formansskapurin kom til ta niðurstøðu, at Joen H. Andreassen var tann rætti maðurin. Eftir stutta umhugsanartíð tók hann av, og var hetta eitt gott val. Joen H. Andreassen boðaði beinanvegin frá, hvussu leingi hann fór at sita, og á heysti 2005 varð so aftur farið at leita eftir tí næsta umboðsmanninum og fall valið á meg. Eitt samt Løgting valdi meg tann 23. november 2005 og tann 8. oktober 2010 afturvaldi Løgtingið meg sum umboðsmann fyri tíðarskeiðið 1. januar 2011 til 31. desember 2016.

**Eyðkenni fyri ein umboðsmansstovn**

Sum heitið bendir á, er umboðsmaðurin ein stovnur undir Føroya Løgtingi. Umboðsmaðurin verður valdur fyri eitt fimmára tíðarskeið at hava eftirlit við fyrisiting heimastýrisins. Umboðsmaðurin er í sínum virksemi óheftur av tinginum, og umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál hann viðger. Løgtingið kann tí ikki áleggja umboðsmanninum at taka ávís mál upp til viðgerðar. Um Løgtingið ikki longur hevur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av Løgtinginum tó loysa henda úr starvi.

Vanliga verða nøkur eyðkenni heft at hugtakinum „umboðsmaður“: Fyri tað fyrsta, at hann er avgjørt óheftur av myndugleikum og øðrum.

Fyri tað næsta, at møguleikarnir hjá borgarunum at leggja mál fyri umboðsmannin skulu vera góðir. Fyri tað triða skal umboðsmaðurin mótvegis myndugleikunum kunna vísa á viðurskifti, sum ikki eru nøktandi. Og fyri tað fjórða skal tann, sum røkir embætið, vera ein persónur, sum fólk hava álit á og virðing fyri.

Tað, at umboðsmaðurin er óheftur av Løgtinginum, sæst m.a. í tí áseting, at umboðsmaðurin verður valdur fyri eitt fimmára tíðarskeið og kemur ikki í polistisk „spæl", tá landsstýri og løgtingsnevndir skulu veljast. Harafturat skal ein stórur meiriluti, tveir triðingar av tinginum, atkvøða fyri uppskoti at koyra umboðsmannin frá. Umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál umboðsmaðurin viðger, og Løgtingið kann ikki áleggja umboðsmanninum at kanna ávís mál neyvari.

Gáttin hjá vanligum borgarum at ráðføra seg við ella klaga til umboðsmannin er lág. Tað kostar onki at klaga til umboðsmannin, og eingi formlig krøv eru um, hvussu klagað verður. Ein og hvør, sum ikki heldur seg hava fingið rætta viðferð frá almennum myndugleikum, kann klaga til umboðsmannin. Hesin møguleikin er eisini ein liður í at tryggja rættartrygdina í samfelagnum.

Skipanin við umboðsmanninum leggur upp til, at umboðsmaðurin kann mæla til ella heita á myndugleikar um at viðgera mál umaftur ella broyta mannagongdir. Á hendan hátt er lagt upp til, at umboðsmaðurin verður vegleiðari hjá fyrisitingini, sum sjálv kann rætta síni møguligu mistøk. Men um henda skipanin skal virka eftir ætlan, so krevur tað, at fyrisitingin eisini er búgvin at viðurkenna møgulig brek og at rætta tey.

Skipanin krevur eisini, at politiska skipanin er búgvin. Tá umboðsmaðurin rakar við álvarsom lýti ella brek, skal hann eftir lógini boða formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og avvarðandi landsstýrismanni frá hesum. Harvið verða hesir partar óbeinleiðis drignir inn í málið. Taka myndugleikarnir ikki tilmælini frá umboðsmanninum í álvara, og verða ásjónligir feilir ikki rættaðir, ella ivasamar mannagongdir broyttar, kann henda støðan í seinasta enda fáa politiskar avleiðingar.

**Tørvurin á einum umboðsmanni**
Tað er sett spurnartekin við, um vit í Føroyum hava brúk fyri einum umboðsmanni. Eitt sjónarmið er, at samfelagið er lítið, og at tað tí er lætt at hava gjøgnumskygni í fyrisitingini og hava eftirlit við, hvat myndugleikarnir gera. Eitt annað sjónarmið er afturímóti, at serliga í smáum samfeløgum er tørvurin størstur at hava ein óheftan eftirlitsstovn. Í smáum samfeløgum eru ikki sterkir áhugabólkar við professionellum starvsfólkum, sum hava eftirlit við, at myndugleikar ikki misbrúka sítt vald ella viðgera borgarar eins og eftir galdandi lógum og reglum.

Í smáum samfeløgum kann tað tykjast trupult at taka tyngjandi avgerðir ella avgerðir, sum eru illa umtóktar. Av tí at tað er stutt ímillum borgarar, fyrisiting og politikkarar, er størri vandi fyri „persónligum sambondum". Avleiðingin av hesum er, at avgerðir stundum verða tiknar, uttan at nøkur formlig málsviðgerð fer fram. Politikkur hevur ofta størri týdning fyri úrslitið í einum máli enn galdandi lógir og reglur, sum verða settar til viks. Í slíkum førum verður ofta roynt at lata vera við at hava viðurskiftini skrivlig og formlig, og ein serlig politisk og sosial mentan tekur seg upp. Dentur tykist verða lagdur á smidligar, effektivar og skjótar avgreiðslur.

Nevndu viðurskifti tala fyri, at tørvur er á einum sterkum og óheftum eftirlitsstovni sum umboðsmanninum ella dómstólinum fyri at halda útinnandi valdið á rættari leið og fyri støðugt at minna á meginregluna um virðing fyri rættarsamfelagnum og galdandi lógum og reglum. Tað hevur stóran týdning, at umboðsmaðurin ikki letur seg ávirka av dagsins trætum og ósemjum, ella letur seg stýra av kenslum í ítøkiligum málum og soleiðis fara av kós frá grundleggjandi samfelagsligu meginreglunum um demokrati, rættarsamfelag og rættvísa málsviðgerð.

Eg fari at enda hesa grein við nøkrum orðum hjá Johnhardi Klettheyggj, fyrrverandi ráðgeva hjá Løgtingsins umboðsmanni. Í sínum fyrilestri á 10 ára haldinum viðgjørdi hann spurningin um, hvussu umboðsmansskipanin fer at gagna samfelagnum frameftir. Hann vísti á, at hesin spurningur liggur ikki bara í hondum umboðsmansins,

men minst líka nógv í hondunum á samfelagnum, bæði tí útinnandi og tí lóggevandi valdinum. Tí, tað er upp til hesar myndugleikar at síggja til, hvussu umboðsmansskipanin verður vird og gagnnýtt til frama fyri rættarsamfelagið Føroyar.

*Birta Biskopstø, ráðgevi*



# *III. Innlit í fyrisitingina*

Tann 1. januar 1994 kom innlitslógin í gildi (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001). Endamálið við lógini var at styrkja um gjøgnumskygni og opinleika hjá myndugleikum, sum viðgera og taka avgerðir, sum ávirka fólk, feløg og samfelagið sum heild.

Innlitslógin skal tryggja borgarum og fjølmiðlum møguleika at fylgja við í, hvat hendir í almennu umsitingini, viðvirka til at skapa áhuga fyri almennum viðurskiftum, og opinleikin skal vera við til at økja álitið á almennu umsitingina.

Lógin hevur serligan týdning fyri fjølmiðlarnar, tí hon gevur teimum møguleika at fylgja við í og halda eyga við, at alt fer rætt fram. Harumframt gevur hon fjølmiðlunum møguleika at viðgera og kunna fólk á røttum faktiskum grundarlagi.

Lógin er ein minimumslóg og viðger bert, nær ein myndugleiki hevur skyldu til at geva innlit. Lógin forðar ikki myndugleikunum í at geva ein borgara ella fjølmiðli meirinnlit.

Innlitslógin er eitt ískoyti til reglurnar um partsinnlit, sum eru ásettar í fyrisitingarlógini. Reglurnar um partsinnlit geva tí einstaka rætt til meira innlit enn innlitslógin, men innlitslógin gevur samstundis einum parti í einum máli møguleika at biðja um innlit í onnur mál, sum líkjast eins egna, og harvið møguleika fyri at kanna siðvenjuna hjá einum myndugleika í ávísum málum.

**Hvørjir myndugleikar eru fevndir av innlitslógini**
Innlitslógin fevnir einans um stovnar undir heimastýrinum.

Sambært § 1, stk. 1 er innlitslógin galdandi fyri alt virksemi hjá almennu fyrisitingini. Innlitslógin fevnir um allar myndugleikar, bæði kommunalar, interkommunalar og landsmyndugleikar. Eisini eru nevndir og arbeiðsbólkar, hvørs virksemi einans er ráðgevandi ella fyribils, eisini fevnir av innlitslógini.

Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 15. november 2001 (j. nr. 200100022), í niðurstøðu sínari staðfest, at Kringvarp Føroya (tá SVF og ÚF), tó ikki programvirksemi og handilsligu viðurskiftini, skulu roknast við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini og innlitslógini.

Innlitslógin er ikki galdandi fyri Løgtingið og stovnar við tilknýti til Løgtingið. Eitt nú er virksemið hjá løgtingsskrivstovuni, umboðsmanninum og landsgrannskoðanini ikki fevnt av innlitslógini.

Stovnar, feløg, grunnar og líknandi, ið eru skipað á privatrættligum grundarlagi, eru sum høvuðsregla ikki fevnd av innlitslógini. Hetta er galdandi, hóast virksemið hjá teimum kann síðustillast við tað virksemi, sum fyrisitingarmyndugleikar vanliga hava. Tó kunnu hesir stovnar v.m. eftir eini ítøkiligari metan koma undir innlitslógina, um teir eru undirlagdir gjøllari almennari skipan, umsjón ella eftiransan. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 29. juni 2004 (j. nr. 200400023),

í niðurstøðu sínari staðfest, at hóast Føroya Barnaheim var ein sjálvsognarstovnur, var stovnurin eftir eini ítøkiligari metan at meta sum ein fyrisitingarmyndugleiki, ið er fevndur av fyrisitingarlógini og innlitslógini.

Partafeløg og íognarfeløg, sum tað almenna er partaeigari ella íognari í, koma ikki undir innlitslógina.

**Viðgerð av innlitsáheitanum**

Tey tíggju árini, sum umboðsmannsstovnurin hevur virkað, hava borgarar og fjølmiðlar klagað til umboðsmannin, tá ið tey hava mett, at tey ikki hava fingið nøktandi viðgerð av innlitsáheitanum. Umboðsmaðurin hevur í hesum tíðarskeiði skrivað 30 álit um millum annað handfaringina, herundir viðgerðartíðina hjá myndugleikum av innlitsumbønum, grundarlagi hjá myndugleikum fyri at nokta innlit, herundir meirinnlit í innanhýsis skjøl og ymisk onnur viðuskifti í sambandi við innlit í fyrisitingina.

Við heimild í innlitslógini kann ein og hvør, eisini í førum har tey ikki eru partur av einum máli, krevja at fáa høvi at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð í sambandi við virksemi hjá myndugleikanum.

Lógin um innlit viðger spurningin um, í hvønn mun myndugleikar hava skyldu til at lata almenningin fáa skjalainnlit. Lógin forðar ikki fyri, at myndugleikin, eftir egnari meting, loyvir meirinnliti, tað vil siga gevur meira innlit, enn lógin setir sum krav, um so er, at annað ikki fylgir av reglunum um tagnarskyldu.

Ásetingarnar í §§ 4 og 5 í innlitslógini skila til høvuðsregluna um víddina á skjalainnlitinum. Møguleikarnir fyri skjalainnliti eru tó avmarkaðir við ásetingunum í §§ 7 til 14. Ásetingarnar í §§ 7 til 11 lýsa, í hvørjum førum eitt skjal kann verða undantikið frá skjalainnliti, meðan ásetingin í § 12 vísir, nær ávísar upplýsingar kunnu verða undantiknar. Ásetingin í § 13 fevnur um bæði skjøl og upplýsingar.

Áheitan um innlit í fyrisitingina skal sambært § 4, stk. 3 í innlitslógini skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við. Tað, sum liggur í hesum kravi er, at viðkomandi skal vísa til skjølini/málið á ein slíkan hátt, at tað út frá hesum gerst møguligt hjá myndugleikanum at finna fram til skjølini/málið.

Til tíðir hava myndugleikar víst á, at innlitsáheitanir hava verið ov ógreitt orðaðar, og við tí grundgeving hevur myndugleikin noktað innlit. Umboðsmaðurin hevur havt mál til viðgerðar, sum hava verið um henda spurning. Í áliti, dagfest 7. juni 2010 (j. nr. 201000006), hevur umboðsmaðurin í niðurstøðu sínari víst á, at áheitanin um innlit var orðað á ein slíkan hátt, at eingin ivi var um, hvat innlitsumbønin fevndi um.

Umboðsmaðurin vísir eisini á, at um so var, at myndugleikin ivaðist í, hvat tað var, sum innlit ynsktist í, hevði myndugleikin sambært vegleiðingarskylduni í § 7 í fyrisitingarlógini skyldu til at venda sær til umsøkjaran fyri at biðja hann útgreina innlitsumbønina. Í áliti, dagfest 3. november 2006 (j. nr. 200600063), viðgjørdi umboðsmaðurin í niðurstøðu sínari spurningin um ein innlitsáheitan í síni heild var nóg neyvt orðað. Hóast innlitsumbønin í síni heild ikki var nóg neyvt orðað, metti umboðsmaðurin, at eingin ivi kundi vera um, at partar av innlitsumbønini vóru nóg greitt lýstir til at viðgera áheitanina um innlit.

**Skjøl, sum eru fevnd av innlitslógini**

Útgangsstøðið sambært innlitslógini er, at rætturin til innlit fevnir um øll skjøl, og at tað krevst ein lógarheimild fyri at nokta innlit.

Skjalahugtakið í innlitslógini fevnir umframt um skrivligt tilfar eisini um tekningar, kort, myndir og líknandi. Eisini fevnir hugtakið um annað tilfar, ið kemur í staðin fyri skrivligt tilfar, so sum, ljóðfílar, filmar, sjónbandaupptøkur og líknandi.

Ikki alt tilfar av omanfyrinevnda slagi, sum verður gjørt av ella kemur til ein myndugleika, kemur undir innlitslógina. Avgerandi treytin fyri at siga, at tilfarið verður fevnt av hugtakinum, er um tilfarið verður fingið

til vega og goymt hjá myndugleikanum sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 2. juni 2010 (j.nr. 201000003), í niðurstøðu sínari viðgjørt spurningin um skjalahugtakið og vísti á, at skjalahugtakið skal tulkast vítt. Spurningurin í tí málinum var, um fráboðaninar, sum MRCC móttók frá Atlantic Airways og noteraðu í teldutøku dagbók stovnsins, vóru at meta sum partur av einari elektroniskari skrá/skráseting sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini, ella um fráboðanirnar vóru elektronisk skjøl, ið vóru fevnd av rættinum til innlit.

Tað eru ikki einans skjøl í einum máli, har myndugleikarnir skulu taka ítøkiligar avgerðir, sum eru fevnd av innlitslógini. Rætturin til skjalainnlit fevnir um skjøl, sum eru til viðgerðar ella hava fingið eina fyrisitingarliga málsviðgerð, herundir eisini skjøl, sum eru í gerð av myndugleikum og í málum um annað alment virksemi, sum til dømis ferðsla, undirvísing, røkt, heilsuverk og bygging.

Lógin er galdandi fyri mál um starvsfólk hjá tí almenna, og sum dømi kunnu nevnast uppsagnarmál. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 18. februar 2009 (j. nr. 200800100), í niðurstøðu sínari viðgjørt spurningin um innlit í einum starvsfólkamáli. Myndugleikin sýtti innlitsumbønini í hesum máli og vísti til, at rætturin til alment innlit fevnir ikki um starvssetanarmál og mál um flytan í hægri starv, jbr. § 2, stk. 1 í innlitslógini.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at talan hvørki var um starvssetan ella um flytan í hægri starv. Talan var tí um skeiva grundgeving frá myndugleikanum um at sýta innlit. Umboðsmaðurin vísti á, at innlitsáheitanin skuldi viðgerast eftir vanligu reglunum í innlitslógini og, at myndugleikin í einum tílíkum máli hevði skyldu til at meta um, hvørt upplýsingar ella skjøl í starvsfólkamálum kundu undantakast almennum innliti.

Umboðsmaðurin hevur í einum øðrum innlitsmáli, í áliti, dagfest 22. juni 2007 (j. nr. 200700024), um uppsøgn av einum starvsfólki, í niðurstøðu sínari víst á, at umboðsmaðurin ikki dugdi at síggja, at innihaldið í uppsagnarskrivinum kundi grundgeva fyri at undantaka

skjalið við heimild í § 12, stk. 1. Hinvegin kunnu grundgevingarnar fyri einari uppsøgn vera undantiknar innliti, í tann mun tær avdúka nakað, sum hoyrir privatlívinum til.

Mál um lóggávu, herundir eisini játtanarlógir, eru bert fevnd av innlitslógini, tá ið tey eru framløgd í Løgtinginum. Sama er galdandi fyri tey skjøl, sum eru partur av lóggávuarbeiðinum hjá myndugleikum. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 4. februar 2009 (j. nr. 200800057), í niðurstøðu sínari viðgjørt spurningin um innlit í lóggávumál, har lógaruppskotið varð sent Løgtinginum, men varð ikki framlagt. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at tá ið talan var um eitt lógarmál, sum ikki var framlagt í Løgtinginum, var málið ikki fevnt av innlitslógini.

**Undantøk frá rættinum til skjalainnlit og ekstraheringsskyldan**
Sambært § 7 í innlitslógini, fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu, brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og brævaskifti millum eitt bý- ella bygdaráð og tess nevndir, deildir og aðrar stovnar ella millum hesar stovnar sínámillum.

Tá ið skjøl eru fevd av undantakinum til skjalainnlit sambært § 7, skal myndugleikin meta um, hvørt ávís av hesum skjølum kortini eru fevnd av rættinum til innlit sambært § 8, ella um tey innihalda upplýsingar, ið innlit eigur at verða givið í sambært § 11 í innlitslógini. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 17. desember 2008 (j. nr. 200800064), og í áliti, dagfest 21. desember 2011 (201000094), í niðurstøðum sínum viðgjørt spurningin um innanhýsis arbeiðsskjøl.

Sambært § 12 í innlitslógini, fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um upplýsingar um privat, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum, tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti. Tó soleiðis, at um bert ein partur av skjalinum kemur undir undantøkini, skal myndugleikin

kunna um tann partin av innihaldinum í skjalinum, sum fellur uttanfyri undantøkini.

Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 24. oktober 2007 (j. nr. 200700050), í niðurstøðu sínari viðgjørt eina klagu um, at myndugleikin, hóast mótmæli frá klagaranum, hevði givið innlit í eitt mál.

Umboðsmaðurin vísti í niðurstøðu sínari á, at ein treyt fyri at afturhalda upplýsingar sambært § 12, stk. 1, nr. 2 er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri virkið, sum upplýsingin viðvíkur, at innlit ikki verður givið. Undantaksreglan kann bert nýtast, um tað sambært einari ítøkiligari meting má haldast at vera ein nærliggjandi vandi fyri einum munandi fíggjarligum tapi hjá umrødda virki, um innlit verður givið.

Reglan er serliga ætlað at verja vinnuloynidómar, har innlit vil kunna skaða kappingarførið hjá viðkomandi. Um myndugleikin, sum hevur fingið eina innlitsumbøn, er í iva um, hvørt innlit eigur at verða givið ella noktað sambært hesari reglu, kann myndugleikin leggja spurningin fyri tann, sum upplýsingarnar viðvíkja, til ummælis. Myndugleikin hevur skyldu til at gera ein ítøkiliga meting av upplýsingunum og taka hædd fyri viðmerkingunum. Tað er tó altíð myndugleikin, sum ger metingina og tekur avgerð um innlitsspurningin.

Sambært § 13 kann rætturin til skjalainnlit verða avmarkað í tann mun, tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi nøkrum ávísum almennum ella privatum áhugamálum. Talan kann til dømis vera um fyrilit fyri trygd ella vernd ríkisins, uttanríkispolitisk ella uttanríkisfíggjarlig áhugamál, fyribyrging, avdúkan og søkjan at lógarbrotum, revsingarfulgerð og líknandi, fremjing av almennum eftirliti og ráðleggingarvirksemi, herundir eisini fíggjarlig áhugamál hjá tí almenna.

Eisini onnur privat og almenn áhugamál enn tey, sum eru nevnd í ásetingini, kunnu, eftir eini ítøkiligari metan, grunda undantøku frá vanligu høvuðsregluni um innlit. Kemur bert ein partur av einum skjali undir undantaksreglurnar, skal tann, sum hevur biðið um innlit, verða kunnaður við restina av skjalinum.

Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 22. juni 2006 (j. nr. 200600017), viðgjørt spurningin um, hvørt ein myndugleiki, sum málið var upplýst, kundi nokta innlit við heimild í § 13, stk. 1, nr. 3. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at myndugleikin ikki við heimild í § 13 kundi sýta innlitsumbønini.

Um so er, at myndugleikin hevur grundaðan iva, um ein áheitan um innlit eigur at verða noktað vísandi til undantøkini, kann mynduleikin biðja um ummæli frá teimum, hvørs áhugamál kunnu vera til hindurs fyri, at áheitanin um innlit verður gingin á møti.

**Samanumtikið**

Í tíðarskeiðinum 2001 til 2011 eru 129 klagur um innlit komnar til umboðsmannin. Av hesum hava 80 klagur snúð seg um avgerðir hjá myndugleikum og 49 um málsviðgerð hjá myndugleikum. Í hesum tíðarskeiði hevur umboðsmaðurin skrivað 30 álit, sum eru um innlitslógina.

Av innkomnum klagum sæst, at tað í stóran mun eru fjølmiðlanir, sum klaga. Tað, sum fjølmiðlanir klaga um, eru sum oftast innlitsáheitanir í mál hjá fyrisitingini, sum eru tíðaraktuel, og sum hava ein almennan áhuga.

Sum nevnt í innganginum, er innlitslógin eitt ískoyti til reglurnar um partsinnlit, sum eru ásettar í fyrisitingarlógini. Klagur frá borgarum hava tí í mestan mun snúð seg innlit í mál, sum borgarin hevur ein persónligan áhuga í, herundir mál, sum líkjast eins egna, soleiðis at borgarin fær møguleika fyri at kanna siðvenjuna hjá einum myndugleika í ávísum málum.

Av hagtølum, sum framganga av ársfrágreiðingum hjá umboðsmanninum, hevur tendensurin av innkomnum klagum um innlit verið vaksandi, tó at talan er um smá tøl. Tað er tí ringt at meta um gongdina, herundir um myndugleikarnir eru vorðnir meira kringir í at nýta lógina og veita innlit.

*Majbritt Lamhauge,*
*fulltrúi*



# *IV. Fráfaringaravtalur innan tað almenna*

Sonevndar fráfaringaravtalur, har arbeiðsgevari og arbeiðstakari av ymiskum orsøkum semjast um, at samstarvið partanna millum skal halda uppat, eru arbeiðsrættarliga ein natúrligur, lógligur og alment góðkendur liður, á einum vælvirkandi og dynamiskum arbeiðsmarknaði og kann í nógvum førum verða við til at tryggja áhugamálini hjá bæði arbeiðsgevara eins væl og arbeiðstakara.

Spurningurin um rættarligu støðuna, ið fráfaringaravtalur hava innan almenna arbeiðsmarknaðin, er ikki nógv viðgjørdur, men við tveimum úrskurðum, báðir dagfestir 16. november 2004, staðfesti Hægstirættur, at ein starvssetan á almenna arbeiðsmarknaðinum, á sama hátt sum á privata arbeiðsmarknaðinum, kann halda uppat við avtalu millum partarnar. Nevndu dómar eru endurgivnir í danska

lógartíðarritinum „Ugeskrift for Retsvæsen“ fyri árið 2005, ávikavist á bls. 616 og 622 (U2005.616H og U2005.622H).

Í eini frágreiðing, dagfest 21. desember 2004, umbiðin av rættarnevndini hjá Fólkatinginum í kjalarvørrinum á úrskurðunum hjá Hægstarætti, vísti danski umboðsmaðurin á, at tágaldandi rættarpraksis, viðvíkjandi sonevndum fráfaringaravtalum innan almenna arbeiðsmarknaðin, hevði verið fyri eini kollveltandi broyting, og at Hægstirættur grundleggjandi hevði broytt kós hesum viðvíkjandi.

Frágreiðingin letur ongan iva verða um, at umboðsmaðurin metir, at rættartrygdin hjá alment settum starvsfólkum, sum avleiðing av úrskurðunum hjá Hægstarætti, er ivasom, og at rættarstøðan viðvíkjandi fráfaringaravtalum innan tað almenna av somu orsøk er ógreið.

**Praksis fyri 16. november 2004**

Reglur um hvussu ávikavist ein arbeiðsgevari og ein arbeiðstakari kann verða loystur frá eini starvssetan, eru at finna í lógum, herundir t.d. Tænastumannalógini (Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 19. mai 2008) og Starvsmannalógini (Løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn/funktionærer, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 2. juni 1970), og harumframt í sáttmálum.

Hesar lógar- og sáttmálaásetingar eru í stóran mun av prosessuellum slag og viðvíkja uppsøgn annaðhvørt við umsókn, har arbeiðstakarin tekur stig til at verða loystur úr starvi, ella uttan umsókn, har arbeiðsgevarin tekur stig til at enda starvssetanina. Reglurnar siga sostatt einki um uppsøgn eftir avtalu, vanliga nevnt fráfaringaravtalur.

Umframt omanfyri nevndu lógar- og sáttmálaásetingar hevur eisini Fyrisitingarlógin (Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg/om forvaltning) umframt óskrivaðu fyrisitingarligu meginreglurnar, herundir markreglan, líkareglan, officialprinsippið og meginreglan um góðan fyrisitingarligan sið, beinleiðis ávirkan á

mál viðvíkjandi uppsøgn á almenna arbeiðsmarknaðinum, og eru tað serliga reglurnar um partshoyring, lógarinnar kap. 5, og grundgeving, kap. 6, sum eru av týdningi í hesum sambandi, eins og kap. 3 um vegleiðing og umboðan, og kap. 4 um skjalainnlit partanna hava ein ávísan týdning.

Týdningurin av prosessuellu reglunum í sambandi við uppsøgn sæst týðuliga í tí praksis, sum ávikavist dómstólarnir og umboðsmaðurin hava havt gjøgnum tíðirnar. Við úrskurði sagdur í Hægstarætti (U2003.1660H) fekk arbeiðstakarin endurgjald fyri ósakliga uppsøgn vegna brot á markregluna, eins og brot á reglurnar um partshoyring, skjalainnlit og grundgeving í U1999.1337H viðførdi, at arbeiðstakaranum varð veitt endurgjald fyri ósakliga uppsøgn.

Spurningin um fráfaringaravtalur – *avtalaða uppsøgn* – hava dómstólarnir ikki áðrenn Hægstarættarúrskurðarnar frá 16. november 2004 havt høvi til at taka støðu til í serliga nógvum førum, og er rættarpraksis hesum viðvíkjandi tí sera avmarkað. Tó er spurningurin í ein ávísan mun viðgjørdur av Hægstarætti í úrskurði U1974/3H, har rætturin staðfesti, at ein arbeiðstakari við avtalu kann frásiga sær rættindi, sum viðkomandi annars vildi havt við uppsøgn uttan umsókn. Tann 19. desember 2002 hevur Eystari Landsrættur gjørt úrskurð, har staðfest verður, at ein tænastumaður við avtalu hevur frásagt sær rættartrygdina, ið reglurnar í Fyrisitingarlógini eru til fyri at tryggja.

Fólkatingsins Umboðsmaður hevur, í síni praksis viðvíkjandi uppsøgn við avtalu, sum heild ikki viðurkent fráfaringaravtalur sum eitt nýtiligt amboð í starvsfólkarættarligum høpi á almenna arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis hevur umboðsmaðurin í FOB (Folketingets Ombudsmands Beretning) fyri árið 1998 á bls. 491 staðfest, at ein avtala um treytirnar í sambandi við eina uppsøgn ikki er ein avtaluspurningur og tí ikki er fevnd av avtalurættinum, men er fevnd av „avgerðarhugtakinum“ í fyrisitingarrættinum.

**Rættarstøðan eftir 16. november 2004**
Sum nevnt innleiðandi, metti umboðsmaðurin, at Hægstirættur við sínum úrskurðum tann 16. november 2004 grundleggjandi hevði

broytt kós, hvørjum uppsøgn við avtalu viðvíkur, og at rættarstøðan sum ein avleiðing av hesum var ógreið.

Sum víst á omanfyri, hevur rættarskipanin bert í fáum førum havt høvi til at viðgera spurningin um fráfaringaravtalur, áðrenn umrøddu dómar frá 2004, men greitt er, av tí praksis, sum tó finst frammanundan, at dómstólarnir sum heild viðurkenna, at arbeiðstakari við avtalu kann frásiga sær rættindi, sum viðkomandi annars hevur sambært lóg og/ella sáttmála.

Tað, sum kann sigast at vera tann kollveltandi broytingin í dómunum frá 2004, er, at Hægstirættur staðfestir, at sambært bæði orðaljóðinum og viðmerkingunum til Fyrisitingarlógina fella avtalur millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara sum heild uttanfyri „avgerðarhugtakið", sum er grundarlagið undir øllum fyrisitingarrættinum, og tí kann ein avtala sum útgangsstøði ikki viðgerast í fyrisitingarligum høpi.

Og júst henda staðfesting fekk beinleiðis avleiðing fyri umboðsmansstovnin, tí við hesum var øll tann praksis, sum umboðsmaðurin hevði havt fram til 16. november 2004, sett úr gildi. Avleiðingin sæst aftur í, at umboðsmansstovnurin eftirfylgjandi sum heild hevur avvíst øll mál viðvíkjandi fráfaringaravtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Vert er at viðmerkja, at Hægstirættur í grundgevingum sínum fyri áðurnevndu úrskurðum leggur stóran dent á heilt konkret viðurskifti, ið vóru viðvirkandi til, at rætturin metti, at avtalan hevði bindandi virknað, herundir at partarnir vóru at meta sum javnbjóðis partar, og at avtalan í sínum orðaljóði, gjørdi fult og heilt upp við øll viðurskifti partanna millum.

Sostatt kann staðfestast, at tá ein fráfaringaravtala er fevnd av avtalurættinum, skulu avtalurættarligu reglurnar verða uppfyltar, fyri at ein tílík avtala kann fáa løgfrøðisligt gildi, og kann grundarlagið undir eini fráfaringaravtalu til eina og hvørja tíð roynast í rættarskipanini. Í úrskurði U2009.1961V tók Vestari Landsrættur støðu til bæði fyrisitingarliga- og avtalurættarliga spurningin viðvíkjandi eini frá-

faringaravtala og kom til ta niðurstøðu, at málið skuldi viðgerast eftir avtalurættarligum reglum, og at grundarlag var ikki fyri at tilsíðisseta avtaluna.

Sum ein natúrlig avleiðing av úrskurðunum í Hægstarætti hevur eisini Løgtingsins umboðsmaður fylgt sama leisti sum Fólkatingsins umboðsmaður og avvíst at viðgera mál um uppsøgn við avtalu.

Føroyski umboðsmansstovnurin hevur tó einans í tveimum førum tikið støðu til mál viðvíkjandi fráfaringaravtalum innan almenna arbeiðsmarknaðin.

Fyrra málið, sum er endurgivið í áliti, dagfest 27. februar 2004, jnr. 200300031, er viðgjørt áðrenn Hægstirættur gjørdi úrskurð, og har staðfesti umboðsmaðurin m.a., at Mentamálaráðið ikki hevði yvirhildið fyrisitingarligu ásetingarnar um partshoyring, og at tað sum heild framgekk av málinum, at ein avtala millum aðalráðið og klagaran ikki kundi metast at verða inngingin á nøktandi grundarlagi.

Í seinna málinum, sum er frá 2006, jnr. 200600030, avvísti umboðsmaðurin at fara inn í málið, og lagdir vórðu til grund omanfyri nevndu Hægstarættarúrskurðir vísandi til, at ein avtala varð gjørd millum partarnar.

**Samanumtikið**

Við at velja at gera eina avtalu um fráfaring skal ein arbeiðstakari gera sær greitt, at avleiðingin er, at tann rættartrygd, ið finst innan karmarnar í fyrisitingarrættinum, ikki er galdandi, tá ein avtala verður tikin framum eina fyrisitingarliga prosess, og málið kann í síni heild ikki viðgerast eftir hetta í fyrisitingarligum høpi, men kann tó roynast sum eitt avtalurættarligt mál í rættarskipanini.

Í hvønn mun avtalur av hesum slag verða gjørdar á almenna arbeiðsmarknaðinum í Føroyum í dag, er torført at meta um, tí flestu av hesum málum verða væntandi ongantíð roynd innan fyrisitingarligu kærumyndugleikarnar og verða í besta føri tikin víðari til rættarskipanina.

Tað er tó nakað, ið bendir á, at hóast fráfaringaravtalur javnan verða gjørdar, eisini millum almennan arbeiðsgevara og arbeiðstakara, verða flestu „fráfaringarmál“ handfarin sum starvsfólkamál eftir traditionellum starvsfólka- og fyrisitingarligum reglum og mannagongdum.

Sambært hagtølunum hjá Løgtingsins umboðsmanni fyri árini 2009 – 2011 hevur talið av klagum um starvsfólkamál verið ávikavist 14 klagur í 2009, 4 klagur í 2010 og 8 klagur í 2011.

Hóast hesi tøl eru ov smá til at kunna nýtast sum grundarlag undir eini berandi niðurstøðu, er tað nærliggjandi at umhugsa, hvørjar orsøkirnar kunnu vera til, at tað samanumtikið eru so fáar klagur um starvsfólkaviðurskifti, tá havt verður í huga, hvussu nógv starvsfólkamál av ymiskum slag, sum dagliga verða handfarin innan almenna arbeiðsmarknaðin.

Ongin ivi er um, at nógv tey flestu starvsfólkamálini verða viðgjørd og handfarin sambært galdandi reglum og greiðum mannagongdum, og er hetta eisini galdandi fyri uppsagnarmál. Tó er vert at umhugsa, hvørt klagurnar til Løgtingsins umboðsmann um starvsfólkaviðurskifti, herundir serliga um uppsagnir, høvdu verið fleiri í tali, um ikki ein ávísur partur av hesum málum endaðu við eini fráfaringaravtalu.

# *V. Um embætið*

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 8. oktober 2010 endurvaldi Løgtingið meg sum Løgtingsins umboðsmann fyri tíðarskeiðið 1. janaur 2011 til 31. desember 2016. Eg tók við embætinum á fyrsta sinni tann 1. janaur 2006. Umframt meg sjálva hevur embætið verið mannað við løgfrøðiligu starvsfeløgum mínum, Jóhannu Arge, ráðgeva, Birtu Biskopstø, ráðgeva, og Jette Eirikstoft, sum tann 1. september varð sett í staðin fyri Lailu Egholm, skrivstovuleiðara.

Í sambandi við at Jóhanna Arge, ráðgevi fór í farloyvi í november 2011, varð Majbritt Lamhauge sett í starv sum fulltrúi til 1. januar 2013.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum. (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera

umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá. (§ 12).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

*Adressan e*r: Traðagøtu 43, Postsmoga 2008, FO-165 Argir, og teldupostadressan er lum@lum.fo.
Heimasíða umboðsmansins er: www.lum.fo

# *VI. Gongdin í 2011*

Í 2011 vórðu upprættað 60 mál, sum innihildu 61 sjálvstøðugar klagur. Av teimum málunum, sum komu inn í 2011, vóru 46 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2011. Harumframt vóru 15 mál avgreidd, sum vóru innkomin (men ikki avgreidd) í 2009 og 2010.

Talið av klagum í 2011 er væl lægri enn undanfarin ár, og talið av avvístum klagum er somuleiðis væl hægri. Talið av avvístum klagum hevur tó verið skiftandi gjøgnum árini frá 50% til 75%. Tað er torført at geva nakra neyva frágreiðing fyri hesari gongd, og sær tað út til, at talið av klagum higartil í ár hevur verið vaksandi.

Av tí at talið av klagum er minkað, hevur hetta givið arbeiðsorku at gera kanningar og eftirlitsvitjanir á stovnum, sum hýsa okkara veikastu samfelagsborgarum.

Í 2011 vóru 10 ár liðin, síðani umboðsmaðurin fór til verka. Í hesum sambandi varð hildið eitt hátíðarhald fyri 10 ára stovningardegi Løgtingsins umboðsmansins í Skálanum í Norðurlandahúsinum. Umleið 150 fólk luttóku á hátíðarhaldinum. Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, setti ráðstevnuna. Johnhard Klettheyggj, leiðandi løgfrøðingur í Almannamálaráðnum, sum var við til at byggja umboðsmansembætið upp og starvaðist her frá 2001-2008, helt ein fyrilsetur við heitinum: „Hvat hava vit rokkið hesi 10 árini“. Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, helt ein fyrilestur við heitinum „Løgtingsumboðsmaðurin – frustratión ella inspiratión“, og at enda helt Róbert R. Spanó, professari við Háskóli Íslands ein fyrilestur við heitinum „Hava vit sum eitt lítið samfelag brúk fyri einum umboðsmanni? Royndir úr Íslandi.“

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í august var íslandski

umboðsmaðurin vertur fyri einum slíkum fundi á Vestmannaoyggjunum, og í desember var danski umboðsmaðurin vertur fyri einum fundi í Keypmannahavn.

# *VII. Hagtøl*

**Klagur innkomnar í 2011 býttar á myndugleikar**
Í 2011 vórðu upprættað 60 mál, sum innihildu 61 sjálvstøðugar klagur. Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| ***Myndugleiki:*** | ***Klagur:*** |
|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 4 |
| Uttanríkisráðið | 2 |
| Innlendismálaráðið | 3 |
| Fiskimálaráðið | 2 |
| Mentamálaráðið | 3 |
| Vinnumálaráðið | 3 |
| Almannamálaráðið | 1 |
| TAKS | 5 |
| Kommunur | 6 |
| Tryggingareftirlitið | 1 |
| Trygging | 1 |
| Almannastovan | 4 |
| Nærverkið | 1 |
| Barnavernd | 2 |
| ALS | 1 |
| Landssjúkrahúsið | 2 |
| Akstovan | 1 |
| Umhvørvisstovan | 2 |
| Búnaðarstovan | 2 |
| Banki | 1 |
| El-nevndin | 1 |
| Fjølmiðlanevndin | 1 |
| FO-ráðið | 1 |
| Kærunevndin í almanna- og heilsumálum | 1 |
| Kærunevndin í Lendismálum | 3 |
| Vinnukærunevndin | 2 |
| Rithøvundur | 1 |
| Føroya Landfúti | 1 |
| Vinnuháskúlin | 2 |
| Studentaskúlar | 1 |
| **Tilsamans** | **61** |

**Klagur innkomnar í 2011 býttar á myndugleikar (talva 1)**



## Innkomnar klagur í 2011 býttar á málsøki og klaguinnihald

(Talva 2)

| *Málsøki:* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* | *Klagur um atburð* |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 8 | 5 | 3 | 0 |
| Almannamál | 4 | 3 | 1 | 0 |
| Heilsuverkið | 1 | 0 | 1 | 0 |
| Skattur v.m. | 3 | 1 | 2 | 0 |
| Undirvísing, gransking v.m. | 1 | 1 | 0 | 0 |
| Fiskivinnumál | 2 | 2 | 0 | 0 |
| Byggimál, umhvørvi v.m. | 14 | 6 | 8 | 0 |
| Innlit | 9 | 4 | 5 | 0 |
| Barnavernd | 2 | 1 | 1 | 0 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 9 | 5 | 4 | 0 |
| Ymiskt | 8 | 4 | 3 | 1 |
| **Tilsamans** | **61** | **32** | **28** | **1** |

**Klagur innkomnar í 2011 býttar á málsøki (talva 2)**



**Klagur innkomnar í 2011 býttar eftir klaguinnihaldi (talva 2)**




**Klagur endaliga avgreiddar í 2011**
Av teimum 61 klagunum, sum komu inn í 2011 vóru 46 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2011. Harumframt vóru avgreiddar 15 klagur frá undanfarnu árum. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki:* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* |
|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 4 | 2 | 2 | |
| Uttanríkisráðið | 1 | 1 | | |
| Innlendismálaráðið | 3 | 3 | | |
| Fiskimálaráðið | 2 | 2 | | |
| Mentamálaráðið | 7 | 2 | 5 | |
| Vinnumálaráðið | 3 | 3 | | |
| Almannamálaráðið | 2 | 2 | | |
| Heilsumálaráðið | 1 | 1 | | |
| TAKS | 4 | 4 | | |
| Kommunur | 5 | 4 | 1 | |
| Tryggingareftirlitið | 1 | 1 | | |
| Trygging | 1 | 1 | | |
| Almannastovan | 3 | 3 | | |
| Nærverkið | 1 | 1 | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Barnavernd | 2 | 2 | |
| ALS | 1 | 1 | |
| Landssjúkrahúsið | 2 | | 2 |
| Akstovan | 1 | 1 | |
| Umhvørvisstovan | 2 | 1 | 1 |
| Búnaðarstovan | 2 | 2 | |
| Banki | 1 | 1 | |
| El-nevndin | 1 | 1 | |
| FO-ráðið | 1 | 1 | |
| Kærunevndin í almanna- og heilsumálum | 2 | 2 | |
| Kærunevndin í lendismálum | 1 | | 1 |
| Vinnukærunevndin | 2 | 2 | |
| Rithøvundur | 1 | 1 | |
| Føroya Landfúti | 1 | 1 | |
| Vinnuháskúlin | 2 | 2 | |
| Studentaskúlar | 1 | 1 | |
| **Tilsamans** | **61** | **49** | **12** |

## Klagur avvístar í 2011

Í 2011 vóru 49 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

**Klagur endaliga avgreiddar í 2011 (talva 3)**



(Talva 4)

| *Avvísingarorsøk:* | *Klagur* |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 3 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur | 8 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum | 30 |
| Uttanfyri heimildarøki | 8 |
| Afturkallað | 0 |
| **Tilsamans** | **49** |

**Klagur avvístar í 2011 býttar eftir avvísingarorsøk (talva 4)**



**Viðgjørdar klagur í 2011 býttar á málsøki**

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2011, kunnu býtast upp eftir malsøki á henda hátt:

(Talva 5)

| *Málsøki* | *Klagur* |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 11 |
| Almannamál | 4 |
| Heilsuverkið | 1 |
| Skattur v.m. | 3 |
| Byggimál, umhvørvi v.m. | 13 |
| Innlit | 14 |
| Fiskivinnumál | 1 |
| Barnavernd | 2 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 6 |
| Ymiskt | 6 |
| **Tilsamans** | **61** |

**Klagur viðgjørdar í 2011 býttar á málsøki (talva 5)**



**Innkomnar klagur 2001-2011**




**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**

Í teimum 12 endaliga viðgjørdu klagunum í 2011 hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

***Viðgerðatíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring | 5 mðr. 24 dagar |
| Samlað | 10 mðr. 27 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum**

Í teimum 49 avvístu klagunum hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

***Viðgerðatíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring | 15 dager |
| Samlað | 1 mðr. 21 dagar |

**Málsviðgerðatíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum**

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

| | Viðgerðartíð aftaná partshoyring | Viðgerðartíð tilsamans |
|---|---|---|
| **Klagur** | | |
| málsviðgerðartíð í miðal: | 1 mðr. 21 dagar | 7 mðr 6 dagar |

## Sammetingar 2009, 2010 og 2011

### Innkomnar klagur m.v.




### Avvísingarorsøk



## Innkomnar og viðgjørdar klagur býttar á málsøki




## Klagur um avgerðir, málsviðgerð og atburð



**Innkomnar klagur býttar á áðalráðini, stovnar undir teimum og kommunur**



# *VIII. Samandráttir av álitum*

**Álit viðvíkjandi klagu um afturkalling av byggiloyvi til neyst í Kollafirði**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um grundarlagið undir afturkallingini av byggiloyvi til eitt neyst í Kollafirði, umframt viðgerðina hjá Kærunevndini í lendismálum av málinum.

Tórshavnar kommuna gav klagaranum byggiloyvi í 2006, men afturkallaði loyvið í 2009. Málið varð kært til Kærunevndina í lendismálum, sum staðfesti avgerðina hjá kommununi. Tá kommunan gav byggiloyvi til neystið, hevði hon ikki fingið staðfest, um byggiloyvið kundi góðkennast av friðingarnevndini. Kærunevndin vísti í avgerð síni á, at byggiloyvið eyðsæð var í stríð við lógargrundarlagið, og tí átti at verið tikið aftur.

Umboðsmaðurin var samdur við kærunevndini í hesum, tí sambært tekningini av nýggja neystinum og fotomyndum av verandi neysti var talan ikki bert um at endurreisa gamla neystið, men at gera eina munandi umbygging av neystinum. Ein slík umbygging krevur góðkenning frá friðingarnevndini sambært § 2, stk. 2, nr. 1 og stk. 4 í náttúrufriðingarlógini. Klagarin fanst at kærunevndini, tí hon hevði eina aðra grundgeving enn kommunan fyri at afturkalla byggiloyvið.

Umboðsmaðurin vísti á, at ein kærumyndugleiki kann kanna øll kærumál av nýggum og koma við øðrvísi grundgevingum umframt at seta sína egnu avgerð í staðin fyri kærdu avgerðina.

Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja annað, enn at avgerðin um afturkalling av byggiloyvi var røtt og lóglig. Tó helt umboðsmaðurin tað vera átaluvert, at kommunan hevði givið byggiloyvi uttan at kanna rættarligu viðurskiftini, áðrenn byggiloyvið varð játtað.
Journalnummar: 201000008.

***Álit viðvíkjandi klagu um vantandi innlit frá Mentamálaráðnum***
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi innlit frá Mentamálaráðnum í tvey journalyvirlit. Klagarin fekk ikki innlit í journalyvirlitini, fyrr enn umboðsmaðurin á øðrum sinni spurdi Mentamálaráðið um viðgerðina av innlitsáheitanini.

Umboðsmaðurin vísti á, at journalyvirlit eru beinleiðis fevnd av rættinum til innlit sambært § 5, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini, og vísandi til, at innlitsáheitanin var greið og einføld at viðgera, helt umboðsmaðurin tað vera átaluvert, at Mentamálaráðið ikki fyrr hevði tikið støðu til hendan partin av innlitsáheitanini.

Umboðsmaðurin átalaði somuleiðis, at ráðið ikki sendi klagaranum journalyvirlitini, fyrr enn umboðsmaðurin á øðrum sinni spurdi um hetta.
Journalnummar: 201000050.

**Álit viðvíkjandi klagu um setanarviðurskifti hjá undirvísara á Føroya Læraraskúla**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eitt mál um setanarviðurskiftini hjá einum undirvísara á Føroya Læraraskúla. Viðgerðin snúði seg um, um Føroya Læraraskúli segði klagaran úr starvi, ella um skúlin segði upp eina avtalu við Føroya Studentaskúla og HF-skeið, har viðkomandi var í føstum starvi, um at læna klagaran sum undirvísara.

Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at siga, at klagarin var at meta sum starvssettur á Føroya Læraraskúla við teirri avleiðing, at Føroya Læraraskúli hevði skyldu til at viðgera málið sum eitt mál um uppsøgn eftir fyrisitingarlógini.

Umboðsmaðurin legði avgerandi dent á, at klagarin var í føstum starvi á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, at formligu viðurskiftini kring hesa setan vóru óbroytt, og at rektarin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði tískil hevði arbeiðsgevaraheimildirnar.

Vísandi til drúgva áramálið klagarin hevði undirvíst á Føroya Læraraskúla helt umboðsmaðurin, at tað hevði sømt seg betur og verið í betri samsvari við góðan fyrisitingarsið, um Føroya Læraraskúli hevði boðað klagaranum frá, at hann ikki framhaldandi skuldi undirvísa har og givið honum høvi til at gera viðmerkingar til ætlanina.
Journalnummar: 200900114.

**Álit viðvíkjandi klagu um sýtan av innliti í starvsfólkamál**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi innlit í starvstreytir og lønarviðurskifti hjá einum ráðgeva hjá Hvannasunds kommunu.

Kommunan sýtti klagaranum innlit í málið vísandi til § 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini, ið snýr seg um verju av privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftunum hjá einstaklingum.

Umboðsmaðurin vísti á, at fyri at undantaka upplýsingar um fíggjarlig viðurskifti við heimild í § 12, stk. 1, nr. 1, skal talan vera um upplýsingar, sum kunnu avdúka nakað um privatu fíggjarstøðuna hjá viðkomandi. Upplýsingar um, hvørjar uppgávur eitt starv fevnir um, eins og upplýsingar um, hvat ein persónur fær í løn frá einum almennum arbeiðsgevara, eru upplýsingar, sum viðvíkja starvinum, sum eru fevndar av rættinum til innlit.

Umboðsmaðurin mælti Hvannasunds kommunu til at taka innlitsumbønina uppaftur til viðgerðar og lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum.
Journalnummar: 201000067.

**Álit viðvíkjandi setan av aðalstjóra í Uttanríkisráðnum**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt málið um at seta aðalstjóra í Uttanríkisráðnum í juni 2010.

Meirilutin í setanarnevndini innstillaði J sum nr. 1 og K sum nr.

3 til starvið. Umboðini hjá Uttanríkisráðnum mæltu til at seta K, sum virkaði sum aðalstjóri. Eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í uttanríkismálum setti løgmaður K í starvið.

Umboðsmaðurin undraðist á tilmælið hjá landsstýrismanninum í uttanríkismálum at velja umboð fyri Uttanríkisráðið, sum ikki høvdu serligar fortreytir ella førleikar at viðgera og innstilla umsøkjarar til eitt aðalstjórastarv, í setanarnevndina. Eisini metti umboðsmaðurin, at annað umboðið hjá Uttanríkisráðnum var ógegnugt at vera við í viðgerðini hjá setanarnevndini sambært § 3, stk. 1, nr. 5 í fyrisitingarlógini. Grundað á hetta var tað ein feilur í viðgerðini, at landsstýrismaðurin og løgmaður ikki viðgjørdu minnilutatilmælið sum eitt tilmæli, sum kundi vera litað av óviðkomandi áhugamálum.

Sum setanarmyndugleiki hevði løgmaður sambært § 6, stk. 2 í fyrisitingarlógini skyldu at taka støðu til gegnið hjá umboðunum í setanarnevndini. Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at løgmaður ikki tók støðu til henda spurningin.

Umboðsmaðurin helt greiða ábending vera um, at setanartilmælið hjá meirilutanum ikki hevði fingið eina veruliga viðgerð, og umframt hetta átti landsstýrismaðurin í uttanríkismálum sjálvur at havt kannað, hvat lá í ynskinum hjá tí eina umsøkjaranum um eina smidliga skipan fyrsta árið.

Tað var ein veikleiki, at einki skrivligt tilfar var frá viðgerðini hjá landsstýrismanni og løgmanni av setanartilmælinum, og tí sást heldur ikki, hvør orsøkin var til, at umsøkjarin, sum meirilutin hevði innstillað sum nr. 2, ikki varð tikin við í viðgerðina yvirhøvur.

Samanumtikið metti umboðsmaðurin, at viðgerðin var alt annað enn nøktandi, eins og tað var fatan umboðsmansins, at setanartilmælið ikki hevði fingið nakra veruliga viðgerð. Umboðsmaðurin mælti løgmanni til at umhugsa at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð.
Journalnummar: 201000071.

**Álit viðvíkjandi klagu um málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu í einum uppsagnarmáli og av kæruviðgerðini hjá Mentamálaráðnum í sama máli**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu í einum uppsagnarmáli og av kæruviðgerðini hjá Mentamálaráðnum í sama máli.

Umboðsmaðurin metti, at tað ikki var sakligt, at kommunan hevði givið klagaranum eina ávaring fyri álitisbrot fyri at fara til fakfelagið við upplýsingum frá einum innanhýsis skjali. Av tí at hetta ikki varð grundgevingin fyri sjálvari uppsøgnini, valdi umboðsmaðurin ikki at gera meira við henda spurningin.

Umboðsmaðurin hevði ikki grundarlag at finnast at grundgevingini hjá kommununi fyri at siga klagaran úr starvi. Av tí at kommunan uttan úrslit hevði roynt at funnið eina aðra loysn enn uppsøgn, var umboðsmaðurin ikki samdur við klagaranum í, at proportionalitetsreglan ikki varð hildin í hesum máli. Hóast Mentamálaráðið kundi havt verið neyvari í sínari grundgeving, hevði umboðsmaðurin onga orsøk til at finnast at sjálvari niðurstøðuni hjá ráðnum um at staðfesta avgerðina hjá kommununi.
Journalnummar: 201000097.

**Álit viðvíkjandi klagu um avgerð hjá Vágs kommunu um parkeringspláss**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerðina hjá kærunevndini í lendismálum at staðfesta avgerðina hjá Vágs kommunu at krevja 1 parkeringspláss fyri hvørjar 50 m2 av nýtslustigi. Umboðsmaðurin metti ikki, at kærunevndin hevði viðgjørt spurningin um brot á líkaregluna við atliti at ásetingini í byggisamtyktini um parkeringspláss.

Umboðsmaðurin heitti á kærunevndina í lendismálum um at taka málið upp til nýggja viðgerð, og lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum.
Journalnummar: 201100047.

**Skriv viðvíkjandi klagu um drúgva málsviðgerðartíð á Umhvørvisstovuni**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðartíðina hjá Umhvørvisstovuni av einum máli, sum Kærunevndin í lendismálum hevði heimvíst til nýggja viðgerð. Hóast umboðsmaðurin ongar viðmerkingar hevði til málsviðgerðartíðina, gav umboðsmaðurin Umhvørvisstovuni eina átalu fyri ikki at hava svarað skrivum klagarans.
Journalnummar: 201100058.

**Skriv viðvíkjandi klagu um drúgva málsviðgerðartíð á Landssjúkrahúsinum**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Landssjúkrahusið drálaði við at taka uppaftur viðgerðina av einum máli, har eitt starvsfólk hevði fingið eina munnliga átalu.
Journalnummar: 201100039.

**Skriv viðvíkjandi klagu um drúgva málsviðgerðartíð á Psykiatriska deplinum av áheitanum um serlæknaváttanir**
Í sambandi við eina klagu um drúgva viðgerðartíð á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum hevur umboðsmaðurin sent landsstýrismanninum í heilsumálum eitt skriv.
Journalnummar: 201100009.

**Álit viðvíkjandi klagu um uppsøgn á Vinnuháskúlanum vegna sparingar**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um uppsøgn av lærara á Vinnuháskúlanum vegna sparingar. Uppsøgnin varð kærd til Mentamálaráðið, sum staðfesti hesa. Umboðsmaðurin var samdur við Mentamálaráðið í, at talan var um ein veruligan sparitørv á Vinnuháskúlanum.

Umboðsmaðurin helt, at tey framatrættaðu generellu atlitini, sum Vinnuháskúlin legði dent á í uppsøgnini, vóru saklig og viðkomandi.

Umboðsmaðurin helt tað tó ikki verða nøktandi, at Vinnuháskúlin ikki ítøkiliga viðgjørdi spurningin um uppsagnartíðina hjá tænastumonnum, og um tað var sakligt at halda henda starvsbólk uttan fyri útveljingarhópin av starvsfólkum. Av tí at so long tíð er fráliðin, síðani uppsagnirnar vórðu framdar, hevur umboðsmaðurin valt ikki at gera meira við henda spurningin.
Journalnummar: 201000011.

**Skriv um eina klagu um viðgerðina hjá Mentamálaráðnum av fleiri innlitsumbønum**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um viðgerðina hjá Mentamálaráðnum av fleiri innlitsumbønum, sum Mentamálaráðið annaðhvørt ikki hevði svarað, ella sum klagarin metti seg hava fingið eitt ófullfíggjað svar uppá.

Í tveimum førum vísti umboðsmaðurin á, at tað ikki sást, at Mentamálaráðið hevði tikið støðu til innlitsumbøn klagarans, og umboðsmaðurin heitti tí á Mentamálaráðið um at taka støðu til innlitsumbønirnar og boða klagarinum frá niðurstøðu ráðsins.
Journalnummar: 201000058.

# *IX. Skjøl*

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

**3. Partur**
**Kærumál og egin mál**

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.* Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

**4. Partur**
**Kanningar**

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur
## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur
## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur
## Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur
## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# *Skjal 2*

***Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann***

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum o.s.fr.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

„*Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum…*“ (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„…Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðs-

mannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.fr. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin, til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*

Í umboðsmanslógini stendur:

„*Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.*“ (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00,

skriva teldupost til lum@lum.fo ella venda tygum til skrivstovuna í Traðagøtu 43, Argir, um tygum hava spurningar.